## DAGSINS MEINING

# Fútarættur ikki arbeiðsrættur

Uttan at vit vilja leggja okkum út í aktuellu trætuna á Landssjúkrahúsinum skulu vit tó her loyva okkum at seta spurnartekin við hesa nýggju siðvenju hjá landstýrinum at leggja arbeiðsmarknaðartrætur fyri fútarættin. Tað hevur ongantíð verið meiningin við fútarættinum, at hann skal nýtast sum arbeiðsrættur. Hetta gekk klárt fram av samrøðuni, sum ÚF hevði løgfrøðing herfyri, og hetta sigur eisini øll sunn fornuft. Hetta skuldi í sjálvum sær gjørt, at landstýrið hugsaði seg væl um, áðrenn eitt so ógvusligt stig varð tikið.

Rætturin at skipa seg í feløg er ein grundlógartryggjaður rættur. Hesin rættur fevnir eisini um at skipa seg í fakfeløg við tí endamáli at tryggja limirnar búskaparliga og at verja teirra rættindi. Við støði í hesum er tað komið fyri so av og á í øllum demokratiskum londum, at fakfeløg seta í verk tiltøk, har ivi kann vera um, hvørt hesi er í samljóði við galdandi sáttmála ella ikki. Ólógligt verkfall er eitt vítt hugtak og vanliga plaga arbeiðsgevarar í t.d. Danmark at góðtaka eitt ávíst minstamark sum verandi í lagi, um verkfall er lýst í einum sáttmálaskeiði. Talan kann t.d. vera um, at arbeiðið er vorðið niðurlagt í 24 tímar. Hetta er í grundini ikki so áhugavert, tí her er í veruleikanum meira talan um politikk enn um løgfrøði.

Líka síðan hin víðagitni Normann Christensen kom sum eitt ódnarveður inn yvir landið og endavendi almennu fyrisitingini, hevur landsstýrið verið upptikið av at styrkja leiðslurnar á almennu stovnunum. Sterk leiðsla hevur verið eitt av teimum ótgeljandi gandaorðunum, sum tað hevur fokið við hesi seinastu árini. Tað er ivaleyst í lagi við sterkum leiðslum. Men sterk leiðsla merkir ikki í sjálvum sær, at leiðslan altíð hevur rætt, ella at ein leiðsla ikki kann mistaka seg. Sterk leiðsla má hava undirtøku frá starvsfólkinum, um henni skal eydnast at útinna sterka og góða leiðslu. Tað er tí ein ávísur vandi í tí politisku kós, sum landstýrið hevur valt at halda, nevniliga altíð at bakka eina leiðslu upp, uttan mun til, hvat ið hon ger.

Tað er hóast alt møguliga løgfrøðiliga í lagi at fara í fútarættin við einum fakfelag, sum lýsir arbeiðssteðg í einum sáttmálaskeiði, hóast fútarættuirn ikki er ætlaður at virka sum arbeiðsrættur. Men er tað nú politiskt skilagott? Mong ivast, tí landsstýrið í slíkum føri í so hondfast tekur støðu fyri tí leiðslu, sum stendur við einum eftir øllum at døma sjálvskaptum trupulleika. Harvið leggur landsstýrið seg út við alla fakfelagsrørsluna, sum eitt landsstýri sum hetta eigur at standa seg væl við. Hertil kemur so spurningur, hvussu hetta fer at ávirka tað arbeiðið, sum nú gongur fyri seg við at umskipa føroyska arbeiðsmarknaðin, les innføra arbeiðsrætt. Er tað politikst klókt við eini slíkari provokatión sum eitt fútarættarmál er? Ein annar spurningur er, um hetta er klókt soleiðis í allari almindiligheit. Hvat nú, um fyrst Føroya rættur og síðan landsrætturin um eini tvey-trý ár koma til tann úrskurð, at tiltakið var lógligt? Ein triði spurningur snýr seg um, hvørt hetta við fútarættinum er etiskt og demokratiskt forsvarligt. Er hetta ikki at ganga grundlógartryggjaða felagsrættinum í so nær? Er hetta ikki at seta føroysku fakfelagsrørsluna aftur til eina tíð við lítlum og ongum rættindum, og kann eitt landsstýri undir javnaðarleiðslu loyva sær tað? Henda spurningin seta mong sær í hesum døgum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Berufsverbot á Sandi 4

**Eyðun M. Viderø**

Borgarstjórin á Sandi vil fyri ein hvønn prís fáa skrivaran úr starvi, hóast eingin saklig orsøk er fyri hesum. Orsaka hansara eginklóku meðferð helt hann, at hetta kundi hann avgreiða við einum "pennastroki", men lóg og reglur eru eisini galdandi fyri hann, og tá hann frá øðrum fekk at vita, hvat starvsskipanin fyri Sands Kommunu segði, so gjørdist honum kunnugt, at tað fór at verða torført at fáa kommunustýrislimirnar at taka undir við honum í einum uppskoti um uppsøgn av skrivaranum, bæði tí, at tey neyvan vildu leggja navn til tílíka ósakliga viðgerð av sínum meðmenniskjum, og eisini tí at onkur av meirilutalimunum høvdu størv, ið kundu skaða teirra stovn við tílíkari framferð.



**"Så, hvad gør vi nu?"**
Jú formaðurin hevur sett á dagskrá á eyka-framskundaðum fundi mál um at broyta starvsskipanina, soleiðis at tað eina er **borgarstjórin**, ið setir og loysir úr starvi starvsfólk. Og eftir hvat skilst, so hevur meiriluti hansara samtykt hetta við fyrstu viðgerð, men málið skal so hava næstu viðgerð!

Men her hava kommunustýrislimir "hansara" samstundis gjørt seg sekar við samtykki í ósakligu støðu borgarstjórans, tí í hesum máli er hann eirindaleysur!

Eg vóni bert, at borgararnir á Sandi gera sær greitt, hvat hendir, og hvør arbeiðsgongdin og persónliga endamálið er!

Okkara menninskjansligu og persónligu rættindini eru dýrt og tungt vunnin, men tað er skjótt at søpla tey burtur við "autoritets"tænastu og líkasælu!

Annars er alt annað enn hugaligt hjá borgarunum at vita, at skrivarin fær regluliga mánaðarløn fyri at sita heima, meðan keypt arbeiðsmegi ger arbeiði fyri helst meiri løn, tí talan er um tænastu frá bókhaldsvirki!

# Hvørjir eru kraddararnir

**Føroyar helst lættasta land á knøttinum at seta fyritøkur á stovn, sum byggja á annað enn fiskivinnu. So farið bert til verka tit vælútbúnu, sum lítisvirða okkara "faliterandi" høvuðsvinnu.**



**Jógvan við Keldu**

Seinastu árini er ágangurin øktur móti føroysku "kraddarunum" nevniliga reiðaravirksemi og vinnulívsfyritøkum í primeru vinnuni.

Eingin ivi er, at hesin tiltakandi ágangur kennist rættvísari samfelt við nógv útbygdum almennum stovnum.

Liðin eru 35 ár, síðani eg av fyrstan tíð kom uppí føroyskan politikk. Ikki er ov nógv sagt, at tosið ídag líkist prátinum tá, burtur sæð frá, at ídag er margfeldi av fastløntum droymarum bæði í politikki, fólki á almennum og hálvalmennum stovnum og tey, sum liva av studningi úr landskassanum, økt. Hesi undrast, at vit ikki hava fleiri bein at standa á enn fiskivinnuna.

**Hvussu við øðrum vinnum**
Lat meg staðfesta, at ongastaðni á knøttinum er lættari at seta fyritøkur á stovn enn í Føroyum. Tí kundi hóskandi verið spurt, hví hesi vælútbúnu fólk ikki hava sett á stovn annað, enn "faliterandi" fiskivinnu. Hesi, sum bæði í talu og skrivt dagliga leypa á og undirmeta okkara høvuðsvinnu við niðrandi heitinum kraddarar o.a.

Fyrsta liðið í føðiketuni er enn, tað ið drigið verður upp úr sjónum. Í øðrum umfari verður tilfeingið virkað víðari á landi til útflutnings, so vit fáa útlendskan valuta og pening til at umsita land okkara fyri.

Tá Ísland í 1994 fylti 50 ár segði íslendskur professari, at "vit hava nú í 50 ár tosað um at fáa annað enn fiskivinnu til útflutnings, men enn er so at siga einans hesa útflutningsvinnu vit byggja á". Tað tekur tíð.

— Nústaðni, seinastu trý, fýra árini er ávís broyting hend, sum vit sjálvandi eru hugtikin av, men fiskur er framvegis umleið 65% av teirra útflutningi. Vit eiga at fylgja gongdini í Íslandi tætt komandi árini.

**Fiskivinnan ikki givið so lítið**
Á politiska pallinum, hevur Tjóðveldisflokkurin verið tann mest ídni at lopið á okkara fiskivinnu, tá talan í ávísum førum hevur verið alment um at lyfta nakað uppundir, fyri ávísir partar ikki skulu fara fyri bakka. Nú hevur Tjóðveldisflokkurin altíð staðið fyri øllum ella ongum, svørtum ella hvítum, og nú sær út til at fólkafloksungdómur tekur væl undir.

Í 1993 var eg borgarstjóri í Klaksvík, tá virkini og øll línuskipini fóru av knóranum og vórðu privat keypt aftur av skiparum, maskinmonnum o.ø. Tað hugaliga í hesum var, at fakfeløgini í Klaksvík lótu rentufrí lán upp til 550túsund krónur fyri hvørt skipið. — Alt letur seg gera, tá rættur hugburður er fyri vinnupolitikki.

Hetta hevur givið samfelagnum Føroyum risauppæddir seinastu 12 árini, hundraðtals milliónir fyri hvørt skipið á sjógvi og á landi. — Hesi skip vórðu keypt í vánaligastu tíðum og høvdu møguliga sloppið at ligið, um Kristina Háfoss og Tjóðveldisflokkurin høvdu avgerandi orðið. Eisini kann vísast á, at bæði nótaskip, Norrøna o.o. skip hava eisini fingið stuðul til ávísar tíðir, men hava eftirfylgjandi givið okkum øllum gylt.

At rækjuskipini nú verða skýrd kraddarar og fáa onnur heiti, tí tað frá almennari síðu í millumbili verður lyft eitt sindur upp undir fyri at vita, um ikki ein bjarging er, er bæði óbúgvið, ólátað og lítið umhugsað.

**Almennu atfinnararnir hava møguleikan**
Lat verða sagt, at ongantíð hevur verið meiri neyðugt enn nú, at fáa væl útbúgvið fólk í øðrum tættum enn fiskivinnuni, men tað er ikki heilt vandaleyst, tá hesi

*Framhald á næstu síðu*

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.